

## Mikkjal helt frí

Mikkjal Thomassen tók ikki lut í venjingini týsdagin, men sjálvur staðfesti hann tó greitt, at talan ikki er um nakrar stórvegis trupulleika.
- Eg havi verið eymur í hælsinuni í longri tíð, og tí hildu vit, at tað var betri við hvíld í dag. Men eg ivist onga løtu í, at eg eri tøkur í morgin, sigur Mikkjal.

## Tøgn undan dystinum

Við dystarbyrjan í morgin verður tøgn í ein minutt í samkenslu við teimum, sum fórust í vanlukkuni í Stord. Hetta ynski hevur FSF sett fram á fundi við franska fótbóltssambandið, og tað varð alt fyri eitt eftirlíkað.
- Vit vilja við hesum sýna okkara størstu samkenslu til tey, sum fórust í vanlukkuni og til tey, sum sita eftir. Hendingin hevur ávirkað okkum øll í ferðalagnum, og tað er eingin ivi um, at okkara tankar eru hjá teimum, sum eru rakt av hesum, sigur FSF-forsetin, Óli Holm, sum eisini er partur av ferðalagnum í Fraklandi.

# Komið so við kanónunum

**Føroyska liðið hevði seinastu venjingina undan dystinum í Fraklandi í gjár, og nú verður bara bíðað, til dysturin verður blástur ígongd klokkan 20 føroyska tíð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**(Sochaux, Frakland):** Landsliðið var og vandi á Auguste Bonal-leikvøllinum, sum er heimavøllur hjá Sochaux. Talan er um eitt vakurt hugnaligt stadion, har einir 20.000 áskoðarar rúmast. Tað í sjálvum sær ger helst, at umstøðurnar eru minni ræðandi, enn tær annars kundu verið, og hartil tykist vøllurin eisini hóskað okkara monnum væl. Bæði tí undirlendið tóktist rættiliga fast, og tí vøllurin ikki hevur maksimalu støddina. Tað vil siga, at metrarnir í bæði longd og breidd eru færri, og hetta vil alt annað líka vera ein fyrimunur hjá einum liði, sum fyri tað nógva kemur at standa í verjustøðu.



*Um Pauli G. Hansen ikki verður til reiðar at spæla í kvøld, er lítil ivi um, at Kári Nielsen verður avloysarin á sentrala miðvøllinum*

**Fáar broytingar**
Og tað koma okkara uttan iva. Taktikk fundurin hjá hópinum varð ikki fyrr enn um døgurðaleitið í dag, men tað er nokk eingin sum helst orsøk at ivast í, at uppleggið verður sera verjukent.
Og eins lítil ivi man vera um, at uppstillingin í størst møguligan mun verður tann sama, sum hon var móti Litava leygardagin. Einasta ivamálið í so máta er Pauli G. Hansen, sum enn ikki hevur vant restini av hópinum. Sjálvur letur Pauli tó væl at, og vónin er framvegis, at hann er tøkur til dystin. Um so er, at Pauli ikki fær tikið lut, verður tað Kári Nielsen, sum skal loysa av á miðvøllinum. Tað gjørdi hann eisini týskvøldið, tá taktiskar venjingar við verjupartinum stóðu á skránni.
Og so er spurningurin væl eisini, hvørt onkur taktisk justering verður gjørd. Serstakliga kann roknast við, at Rógvi Jacobsen verður togaður nakað aftur á vøllin, so hann í størri mun verður hangandi áleypari í eini 4-4-1-1 uppstilling, sum helst sær soleiðis út: Jákup Mikkelsen – Atli Danielsen, Fróði Benjaminsen, Vagnur Mohr Mortensen, Marni Djurhuus – Jákup á Borg, Pauli G. Hansen (Kári Nielsen), Mikkjal Thomassen, Símun Samuelsen – Rógvi Jacobsen – Christian Høgni Jacobsen.

# Frakland leypir á frá fyrsta bríksli

Eitt stjørnusett franskt lið ætlar at reisa seg eftir tapið ímóti Skotlandi leygardagin. Henry og Saha mynd álopið hjá liðnum

Frakland
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

(Sochaux, Frakland):

Eftir øllum at døma verður tað blást til álop frá fyrsta briksli, tá føroyska landsliðið fer i franska eldin í kvøld.
Tað stendur í øllum førum fast, um hugt verður at uppstillingini, sum fraklendingar væntandi tveita á vøllin í kvøld. Á pappírinum er talan um 4-4-2, men í nógvar mátar tykist talan heldur vera um 4-2-4, har stórt trýst skal leggjast a føroyska liðið langt frammi á vøllinum.
Blaðið, le Republikan, roknar við, at uppstillingin hjá Fraklandi verður hendan: Mickael Leandreau - Willy Sagnol, Lilian Thuram, Jean Alain Boumsong, Julian Escudé - Franck Ribery, Claude Makelele, Patrick Vieira, Florent Malouda - Thierry Henry, Louis Saha.
Talan er um eitt stjørnusett franskt landslið, sum telist millum tey sterkastu í heiminum.

Venjarin ávarar
Franski landsliðsvenjarin ávarar sínar spælarar ímóti at kenna seg ov tryggar í at vinna sínar dystir.
- Eg ávaraði spælararnar undan dystinum ímóti Skotlandi, og tað geri eg eisini áðrenn dystin ímóti Føroyum, segði Raymond Domenech á tíðindafundi í gjár.
- Hetta verður einn trupul bólkur. Skotland gav okkum stórar trupulleikar, og nú skulu vit kappast við teir um fremsta plássið í bólkinum, segði Domenech.



*Thierry Henry, sum her tosar við pressuna á tíðindafundi í gjár, skal spæla í franska álopinum saman við Louis Saha*
*Mynd: Jákup Mørk*